UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **26. september 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-154**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-034/2022 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni, um sparingar hjá Sernámi.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvør nú skal veita sernámsfrøðiliga ráðgeving til starvsfólk og familjur hjá børnum undir skúlaaldur ?

2. Hvussu leingi skulu foreldur, dagstovnar og børn nú bíða eftir sernámsfrøðiligari ráðgeving?

3. Ætlar landsstýrismaðurin at hækka játtanina til Sernám, so tað ikki er neyðugt at tillaga virksemið?

Svar

Til 1: Sernám fer framhaldandi at røkja sernámsfrøðiliga ráðgeving til starvsfólk og familjur hjá børnum undir skúlaaldur.

Sambært stjóranum á Sernámi merkir gjørda tillagingin ikki, at eingin sernámsfrøðilig ráðgeving er til dagstovnarnar. Tillagingin er gjørd í mun til fakbólkarnar sernámsfrøði og sálarfrøði, tí Sernám manglar starvsfólk innan hesar fakbólkar.

Til 2: Tillagingin er fyribils, og fevnir ikki um átøk, sum eru ígongd. Í hesum førum fáa dagstovnar og foreldur at barninum framvegis ráðgeving frá Sernámi í mun til tørvin.

Í tillagingini eru eisini undantøk. Um tørvur er á ráðgeving í mun til børn, har ivamál er um útsetan av skúlabyrjan ella ivamál er um, hvat rætta skúlatilboðið er, er framhaldandi møguligt at fáa sernámsfrøðiliga ráðgeving.

Til 3: Tillagingin, sum Sernám hevur valt at gera, er ikki grundað á væntandi játtan, men á væntandi starvsfólkaorku innan fakbólkarnar: sálarfrøðingar og sernásmfrøðiligar ráðgevarar.

Játtanin til Sernám verður ætlandi hækkað nakað í 2023.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður